


*– Skulu vit megna at fíggja eina góða vælferð, mugu vit hava ein sterkan búskap, og hesin hevur brúk fyri einari sterkari vinnu, sum kann skapa neyðugan vøkstur og inntøkur til samfelagið segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, tá Atlants Kolvetni varð skrásett á VMF, her saman við umboðum fyri oljufelagið og VMF*

*Mynd Jens K Vang*

Fyri at gera vísjónina til veruleika, er neyðugt við framsóknum broytingum. Strategi 2015 verður smíðað í løtuni, og skal hon verða okkara felags boð uppá, hvørjar broytingar og hvørji átøk eru neyðug at fremja, skal visjónin gerast veruleiki.

**Fíggjarmarknaðurin**

Løgmaður nevndi síðani fíggjarmarknaðin: – Ein týdningarmikil partur í okkara samfelag er fíggjarmarknaðurin. Virkar hesin ikki til fulnar, hevur tað stórar avleiðingar fyri einstaklingin, vinnulívið og samfelagið í síni heild.

Virðisbrævamarknaður Føroya virkar fyri at skapa atgongd til fígging hjá vinnuni. Hetta fegnast vit um. Hinvegin mugu vit ásanna, at atgongdin til vágafúsan kapital í breiðari merking er ikki nøktandi í Føroyum – ikki minst tá talan er um fígging til íbirtarar. Vit mugu tí framhaldandi arbeiða fyri at menna fíggjarskipanir, sum kunnu birta upp undir nýskapan.

Nógv hevur verið tosað um einskiljingar seinastu árini og semja tykist vera um, at fyritøkur landsins, sum virka í fríari kapping, eiga at verða einskildar, soleiðis at hetta kann frígeva fíggjarorku hjá landskassanum. Semja er somuleiðis um, at greiður skilnaður eigur at vera millum alment og privat, og tað almenna eigur at tryggja góðar karmar fyri vinnuvirksemi.

Fremstu atlit í eini einskiljingartilgongd eru at tryggja okkara samfelagsligu áhugamál og her fyrst og fremst vælferðina hjá tí einstaka borgaranum. At menna kappingina er í hesum sambandi eitt amboð.

Tað er greitt, at í einum so lítlum samfelag sum okkara hava vit ikki altíð tær bestu kappingarumstøðurnar, og kann hetta vera ein forðing fyri búskaparligari menning.

Sethúsafígging er eitt tílíkt dømi. Kappingin er avmarkað, og tilboðini til sethúsaeigaran eru hareftir. Eingir møguleikar eru fyri eitt nú realkreditsfígging til sethús í Føroyum, og samanbera vit fíggjarkostnaðin í Føroyum við til dømis fíggjarkostnaðin í Danmark, gjalda føroyingar munandi meiri fyri at hava tak yvir høvdið enn danir.

Vit tosa her um fleiri túsund krónur í meirútreiðslum um mánaðin fyri eitt miðal húsarhald. Hetta er peningur, sum annars kundi farið til aðra nýtslu og soleiðis verið við til at stimbra búskapin.

**Broytingartíð**

Løgmaður vísti á, at tað at fyrsta felagið, sum verður skrásett á Virðisbrævamarknaði Føroya, er eitt oljufelag og ikki eitt fiskivinnufelag, er enn ein staðfesting av, at vit liva í eini broytingartíð.

— á vit hugsa um framtíð Føroya, koma vit ikki uttanum at hugsa tankan, hvat hendir, finna vit olju? Hvørja ávirkan fer hetta at hava. Hvat skal gerast, fyri, at Føroyar vera til reiðar at møta avbjóðingunum, eitt møguligt oljuvinnusamfelag hevur við sær?

Vit mugu umhugsa hesar spurningar gjølla. Greitt er, at gerast vit eitt oljuvinnusamfelag, verða avbjóðingarnar, ið møta okkum ikki minni enn í dag.

Til seinast vil eg viðmerkja, at tann mest avgerandi treytin fyri, hvørt Strategi 2015 eydnast ella ikki er, um ætlanin fær undirtøku. Ikki bert politiska undirtøku, men undirtøku í øllum liðum í samfelagnum. Hjá landsmyndugleikunum, kommununum, í vinnulívinum millum verkamannafeløg, arbeiðsgevarafeløg og ikki minst hjá áhugafeløgum og hvørjum einstøkum borgara.

**Samstarv**

Løgmaður nam eisini við spurningin samstarv. -Samstarv millum myndugleikar og vinnu er týdningamikið, og eingin ivi er um, at vit sum í dag sita við politisku ábyrgdini, mugu gera okkara ítasta til at lurta eftir sjónarmiðum hjá øllum áhugabólkum, umrøða hesi sakliga og taka neyðugar og rættar avgerðir.

Vit eiga at hava virðing fyri hvørjum øðrum. Bert um vit arbeiða saman, kunnu vit røkka teimum málum, vit seta okkum. At draga eina línu, skal ikki longur vera ein metaforum, men ein neyðugur veruleiki.

Fyrsta fyritøkan er nú skrásett á Virðisbrævamarknaðinum. Hetta er eitt stórt framstig, ikki bert fyri Virðisbrævamarknaðin og fyri Atlants Kolvetni, men eisini eitt týdningamikil liður í framtíðarmenningini.

Eg ynski Virðisbrævamarknaði Føroya og Atlants Kolvetni hjartaliga til lukku við skrásetingini.

